# Boykotta kappróðurin á ólavsøku

**ÓLÓGLIGUR KAPPRÓÐRARBÁTUR**
Antin fær Páll Fangi úr Klaksvík harðari revsing, ella boykotta øll hini seksannaførini kappróðurin á Ólavsøku

Áki Bertholdsen

Antin fær seksmannafarið, Páll Fangi, úr Klaksvík, harðari revsing, ella rør hann einsamallur á ólavsøku.

Hetta er greiða fráboðanin frá 11 seksmannaførum hjá monnum til Róðrarsamband Føroya.

Og tey 11 seksmannaførini vilja hava svar í seinasta lagi á midnátt í annaðkvøld, týskvøldið, sum er lítla ólavsøkuaftan.

Tað eru hesi 11 seksmannaførini, sum hava tikið so avgjørda støðu: Riddarin, Tvøråbáturin, Smyril, Lómur, Jarnbardur, Herningur, Skúgvur, Hósvíkingur, Húsfrúgvin, Strálan og Sølmundur.

Tey krevja, at Róðrarsambandið tekur málið um ólógliga

## Alt róðrarumhvørvið er á gosi

bekklistan á Páll Fanga upp til nýggja viðgerð og gevur honum eina harðari revsing.

Róðrarsambandið hevur revsað Páll Fanga við at geva honum tvey gul kort, afturfri at hann á tveimum stevnum hevur havt ein ólógligan lista festan upp í lærbekkin fyri at hjálpa teimum aftastu rógvarunum at taka bekktøk.

- Saman hava hugt eftir myndum, sum týðiliga vísa, at Páll Fangi hevur havt nógv umtalaða listar í bátinum minst fýra FM-stevnum í ár, siga hesar 11 róðrarmanningar, sum høvdu fund leygarkvøldið.

Tá ið Páll Fangi bara fær tvey gulum kort fyri hetta, halda hesar 11 manningarnar, at

Róðrarsambandið hevur stigbent nakrar reglur, sum tær halda eru sólaklárar. Og tann reglan er, at er bátur ikki í upprunastandi, er bert ein revsing, og tað er at hann sleppur ikki at rógva, ella skal hann verða kolldømdur í viðkomandi róðri.

- At geva gul kort fyri hetta er í okkara verð púra óviðkomandi, tí soleiðis sum vit lesa lógirnar, er bert ein revsing fyri hetta brot.

Tær 11 bátsmanningarnar staðfesta, at hetta er ikki ein herferð móti Páll Fanga

- Hetta er ein uppgerð við at lógir, og revsingar av lógarbrotum, eru fullkomiliga farin út á eina glíðibreyt, har tað frá máli til mál verður mett og tulkað, hvør skal revsast, hvør ikki skal og hvat revsingin í hvørjum føri skal vera.

Tí krevja hesar 11 manningarnar, at Róðrarsamand Føroya tekur málið upp til nýggja viðgerð og ikki kemur aftur við eini so "hálvhjartaðari og láturligari revsing fyri eitt so sólarklárt brot", sum tær málbera seg.

En hesir 11 bátarnir gera samstundis púra greitt, at hendir tað ikki, fara teir allir samlir at boykotta kappróðurin á ólavsøku og so kemur Páll Fangi at rógva einsamallur.

aki@sosialurin.fo

**Teir bátar, sum ikki møta á ólavsøku, uttan at hava hava hildið frámeldingarfreistina, bróta grein átta í reglugerðini hjá Róðrarsambandinum. Í henni stendur, at frámelding skal verða**

***.........fráboðað Róðrarsambandinum skrivliga í seinasta lagi 5 dagar áðrenn rógvast skal, (vanliga mánadag). Brot á frámeldingartreytirnar til ólavsøkukappróðurin verður sektað við bót kr. 300,- og kann bátur ikki luttaka aftur, fyrr enn hesin peningur er goldin.***

# Allur kappr á ólavsøku í

**ÓLÓGLIGUR KAPPRÓÐRARBÁTUR** Nú er álvarsligur vandi fyri, at avgerðin hjá seksmannaførunum at boykotta kappróðurin á ólavsøku verður víðkað til at umfata allan kappróðurin

Áki Bertholdsen



- Nú er stórur vandi fyri, at allur kappróðurin á ólavsøku verður boykottaður.

Hetta er ein vandi sum hevur tikið seg upp, nú formaðurin í Róðrarsambandinum aðrastaðni í blaðnum í dag staðfestir, at ongin møguleiki er fyri revsa Páll Fanga harðari enn tey longu hava gjørt.

Sostatt verður kravið, sum manningarnar á 11 seksmannaførum hjá monnum setti Róðrarsambandinum fríggjakvøldið, ikki tikið til eftirtektar.

Kravið er, at Róðrarsambandið skal revsa Páll Fanga harðari, annars boykotta allir teir 11 bátarnir róðurin á ólavsøku.

## Avgerðin longu tikin

Men tað er rættiliga fallið teimum fyri bróstið, at formaðurin í Róðrarsambandinum mestsum avgjørdur vísir kravinum aftur, longu áðrenn tað er viðgjørt í nevndini.

Misnøgdin við avgerðina hjá Róðrarsambandið, sum í veruleikanum sleppur Páll Fanga heilt undan revsing, hevur elvt til so stóra misnøgd í róðrarumhvørvinum kring landið, at tað mestsum má kallast øsing.

Og longu áðrenn tey 11 seksmannaførini høvdu fund leygarkvøldið, vóru røddir frammi um, at tað skulu ikki bara verða seksmannaførini hjá monnum, sum boykotta ólavsøkuróðurin.

Tað einasta rætta er, at feløgini sum heild boykotta róðurin, so at ongin bátur fer at rógva á ólavsøku, siga rógvarar kring landið fyri Sosialinum.

Tað hevði ført til, at allur kappróðurin á ólavsøku verður avlýstur.

- Men tað endaði so við, at tað bara blivu vit 11 seksmannafør, sum boykottaðu róðurin, staðfestir Mass Anthoniussen úr Miðvági, sum er talsmaður hjá teimum.

## Røddirnar um boykott harnað

Men hann staðfestir eisini, at røddirnar um eitt fullkomið boykott av øllum ólavsøkuróðrinum eru harðnaðar eftir at Róðrarsambandið longu hevur tikið støðu í málinum til frama fyri Páll Fanga.

Kappróðrarfólk fara væntandi at hava fund í kvøld, har tey fara at viðgera støðuna.

Á fundinum í kvøld er ætlanin fyrst og fremst at staðfesta, avgerðina sum varð tikin leygarkvøldið um, at tey 11 seksmannaførini skulu boykotta ólavsøkuna.

- Endamálið við fundinum í kvøld er eisini at kanna møguleikarnar fyri at fara víðari við málinum.

Sum tað stendur í aðrari grein her á síðunum, hevur Froðbiar Sóknar Róðrarfelag kært avgerðina hjá Róðrarsambandinum fyri dómsnevndini.

- Men eitt evni á fundinum í kvøld verður eisini at kanna møguleikarnar fyri at fáa enn størri undirtøku frá kappróðrarfeløgunum kring landið.

Summi feløg hava longu róð framundir, at tað rætta var, at ongin kappróðrarbátur yvirhøvur mótir á ólavsøku.

- Tað kjakið fara vit at taka upp aftur á fundinum í kvøld, sigur Mass Anthoniussen.

- Eftir okkara tykki er Róðrarsambandið farið fullkomiliga á glið og nú vit eru farin í hernað ímóti tí, fara vit eisini at vita, hvusu langt, vit kunnu taka tað, leggur hann afturat.

## Ólavsøkan oyðiløgd

Hann trýr framvegis ikki upp á at niðurstøðan hjá Róðrarsambandi-